## Minningarorð til

# Súsannu Hansen

f. 06.08.1980 – d. 09.03.2000



Tung var ferðin heim til Føroyar og suður á Torvheyggj eftir at hava fingið tey tungu boð um at tú ikki er millum okkum longur. Ongantíð fyrr havi eg sæð familjuna í so stórari sorg.

Einans 19 ár og so nógvar framtíðarætlanir, altíð glað – altíð eitt smíl. Vit hugsa aftur á tá tú, sum barn, saman við foreldrunum var í Leirvík hvørja summarferiu og vit spældu saman og allir føðingardagarnir tú hevði hjá ommu.

Eftir sita vit sum spurnartekin og kunnu ikki skilja at tú er burtur – at tú ikki kemur norður í summar sum tú altíð hevur gjørt.

Eg minnist seinasta vár tá tú var her í Keypmannahavn og vit gingu gjøgnum »Strøget«, hvør skuldi tá trúð at tað bæði bleiv okkara fyrstu og seinastu ferð. Tað seinastu tíðina tú var her ímillum okkum, skrivaðu vit til hvørja aðra á mobiltelefon, og tú fortaldi at tú møguliga skuldi flyta niður til Keypmannahavn og royna lívið her, nú tú skjótt var liðug við studentarskúlan, men so bleiv ikki.

Men Súsanna góða, hóast tú einans bleiv 19 ár, so hava vit so ótrúliga nógv góð minnir, sum vit vónandi einaferð kunnu læra at liva við, hóast tað verður ringt.

Vit úr Leirvík vilja nú siga farvæl og takka fyri alt.
Hvíl í friði.

**Elspa Jóhanna**

# Parkinson-felagið 10 ár

*Í samband við, at 10 ár eru liðin síðan Parkinsonfelagið varð stovnað, verður áhugaverdur fundur í MBF-húsinum leygardagin 29. apríl kl. 16.00*

Felagið fær vitjan av Poul Winther og Hanne Koplev úr Danmark, ið bæði hava parkinsonsjúkuna. Poul Vinther er 44 ára gamal og er undangongumaður í Parkinsonfelagnum innan »ung og Parkinson« og er kendur fyrilestrarhaldari bæði í Danmark og aðrastaðni. Hartil er hann eisini »yngreudvalgsformand « í danska Parkinsonfelagnum. Sjúklingar, ið fáa staðfest Parkinsonsjúkuna verða alsamt yngri og yngri, í hesum sambandi fer hann í høvuðsheitum at greiða frá hvussu tað er at vera ungur við sjúkuni og hvørjir aktivitetir tey hava í Danmark. Hanne Koplev er 44 ára gomul og útbúgvin djóralækni. Hann fer at greiða frá um akupunktur viðgerðir til Parkinsonsjúklingar. Sjálv er Hanne akupunktør og hevur arbeitt við hesum í eini 10 ár.

Fundurin er almennur.

## Viðmerking:

# Lógloysi ella óskil?

Umframt tað stóra málið í føroyskum politikki, fullveldismálið, hava tveir politiskir høvuðsspurningar fylt breddarnar seinastu tíðina.

Annar spurningurin er um stýrisskipanina í sambandi við fíggjarlógina. Nú verður ikki spurt, hvør liggur uttan fyri lógarinnar karmar, men heldur um yvirhøvur nakar liggur innanfyri lógarinnar karmar. Spurningurin tykist vera farin yvir í eina vekting av, hvat er meira ólógligt enn annað.

Hin spurningurin snýr seg um íløgur, sum liggja á láni eftir fleiri ár undir truplum fíggjarligum umstøðum.

Tummas Arabo hevur eina grein í Sosialinum leygardagin tann 8. apríl og Jan Muller, blaðstjóri, hevur samrøðu við løgmann í sama blað. Niðurstøðan hjá Arabo og Kallsberg er tann sama: skipanin er ikki nóg góð.

Um annars okkurt munagott verður gjørt við spurningin, so er hetta nú ikki so katastrofalt, tá vit hugsa um, at nógvar broytingar eru gjørdar í seinastuni.

**Politikkur**
Politikkur er makt. Politisk makt verður demokratiskt útint við trimum amboðum:

• navngivnir persónar - ofta tað vit nevna stovnsleiðarar ella stjórar -fáa ítøkiligar heimildir yvir øðrum menniskjum og apparati annars
• navngivnir persónar - eisini stovnsleiðarar ella stjórar - fáa ítøkiligar peningajáttanir á fíggjarlógini
• skrivaðar og óskrivaðar reglur um, hvat er góður siður, og hvat ikki er góður siður — tað, sum nú í tíðini verður nevnt "virði"

Í praksis er tað fíggjarlógin, sum skapar teir týdningarmestu karmarnar um, hvussu politiski myndugleikin ynskir, at stýringin skal útinnast í samfelagnum. Ígjøgnum fíggjarlógina fáa navngivnir persónar heimildir yvir játtanum og "apparatum".

Í praksis eru tað teir navngivnu persónarnir - stovnsleiðarar ella stjórar - sum hava ábyrgdina av, at sum best fæst burturúr játtanum og heimildum yvir tí apparati, sum teir varða av. Hesir eru krumtappurin, sum restin av maskinuni snarar um.

Um skipanin ikki er nóg góð, so eru bert tvinnir møguleikar: antin eru hesir stovnsleiðarar og stjórar ikki sína uppgávu vaksnir ella hava teir ikki umstøður til at virka undir.

Aðrir møguleikar gevast ikki.

Skal skipanin bøtast, so er neyðugt at tað triðnevnda amboðið í størri mun verður nýtt: Skrivaðar og óskrivaðar reglur, sum tilsamans vísa leiðina, hvussu tann einstaki í almennum høpi skal virka.

**Siðvenja**
Í samrøðuni við Jan Muller sigur løgmaður soleiðis:
"...tað er bæði rætt og rímiligt, at man syrgir fyri, at hevur ein persónur verið fyri órætti ella bara tann allar minsti ivi er um hann hevur verið fyri órætti, so hevur man skyldu til at gera alt, sum stendst fyri at fáa avklárað slík viðurskifti."

Hetta er greið tala við góðum skili. Við hesum orðum løgmans sigur hann frá, at hann hevur vilja til at brúka tað triðja amboðið — siðvenju, virði — fyri at fáa umsitingina at virka betur.

Kjarnin í málinum liggur nevniliga í spurninginum um, undir hvørjum siðvenjum, "virðum" teir stjórar og stovnsleiðarar, sum í praksis eru krumtappurin í maktútinningini, virka undir.

Siðvenjur verða uppbygdar við prinsipiellum avgerðum í gerandisdegnum.

Tá ið avgerðir falla um hvør stjóri verður frákoyrdur og hvør ikki verður frákoyrdur, hvør landsstýrismaður fer frá og hvør ikki fer frá, verður siðvenja skapt.

Tá ið fíggjarlógir, reglugerðir og aðrir karmar verða settir um stovnsins virksemi, verður siðvenja skapt um, hvussu hesir karmar í praksis fáa sítt skap – og hvussu hesir karmar sleppa at laga seg til veruleikan.

Hesar siðvenjur geva tilsamans hvørjum einstøkum stjóra svar uppá tann persónliga spurningin: hvussu skal eg fara fram, fyri at halda sessin?

**Tænastuskyldur og áhugamál**
Mest grundleggjandi tænastuskyldur hjá stjóra ella stovnsleiðara eru at røkja tey áhugamál, sum stovnurin er settur at røkja, at fáa sum mest burturúr játtaða peninginum og at ráðgeva landsstýrismanninum soleiðis, at hesin hevur møguleika til í praksis at virka langsiktað skilagott.

Vit hava hesi seinastu árini fingið ein hugburð inn í umsitingina, sum á ein ortodoksan og fundamentalistiskan máta starir seg blindan uppá makt-amboðini við einum støði, sum mest av øllum líkist miðaldarinnar maktlæru. Allar aðrar viðkomandi lærur, tað veri seg leiðslulæran, atferðarlæran, organisatión, góður umsitingarsiður, teknikkur o.s.fr. verða skúgvaðar til viks við harðari hond.

Eftir hesi fundamentalistisku maktlæru, mega almennir stjórar ikki fáa makt – sum annars er eitt av teimum trimum beinunum, sum verulig leiðsla byggir á: Vilji og evni til leiðslu, makt til at útinna leiðsluna og "commitment" (viljin hjá teim týðandi pørtunum at taka uppgávuna á seg).

Fylgjan verður, at tænastuskyldur, stovnsins áhugamál, fara í misrøkt, meðan almennir stjórar meira og meira klína seg uppí politisku maktina og føra privatpolitik antin í sjálvdrátti ella saman við landsstýrismanninum.

At navngivnir persónar taka "fordringin" og sum stjórar røkja tey áhugamál, sum teimum er álagt at røkja, verður sjaldsamari og sjaldsamari. Átekur onkur sær fordringin, so verður hann helst sagdur vera ein statur í statinum.

Við tí útsýni, sum eg havi frá arbeiðsplássi mínum, er hendan undirgrivna leiðsluábyrgdin í almenna sektorinum høvuðstrupulleikin í sambandi við tann øgiliga íløgutørvin, sum nú dagar undan kavi og í sambandi við trupulleikan hjá landsstýrismonnum at virka innan fyri lógarinnar karmar.

Og forrestin eisini høvuðstrupulleikin í sambandi við so mangt annað, sum ikki fæst at virka meira enn næstbest.



**Fíggjarlógarviðgerð**
Ein máti at viðgera fíggjarlógina er at nýta hana til at trýsta stjórar og stovnsleiðarar. Hetta verður gjørt við reglum og ásetingum um smálutir í, hvussu verkini í praksis skulu útinnast, sum stjórarnir annars á pappírinum hava ábyrgdina av.

Grundsjónarmiðið er, at ein stjóri vil altíð brúka meira og sløsa við tí tilfeingi, sum honum verður álagt at umsita.

Lønarkarmar, rakstrarkarmar, íløgukarmar, ferðakarmar o.a. spríkja fram í hvørjari reglu í fíggjarlógini. Stjórarnir, sum eru krumtappurin í at fáa tingini at virka í praksis, royna eftir førimuni at leggja seg eftir, hvussu skipanin kann "lumpast" ella hvussu teir kunnu seta politiska myndugleikan skák-mát.

Niðurslitnar íløgur og vantandi menning er tann mest vanligi mátin at sleppa sær undan ábyrgd. Stjórin átekur sær at leiða raksturin. Ein niðurskurður í játtan verður allur tikin av íløgunum og viðlíkahaldi, soleiðis at bæði fólk og rakstrargøgn verða niðurslitin við árunum — men uttan at tann vanligi borgarin ella landsstýrismaðurin sær tað í fyrsta umfari.

Tá ið so íløgutørvurin dagar undan kavi, so er bert ein "svarti-Per": fíggjarmálaráðharrin. Stjórarnir standa á rað við himmalvendum eygum: "Hetta er jú úrslitið av politiskum prioriteringum. Vit hava bert gjørt, sum okkum var álagt." Tann politiski myndugleikin stendur skák-mát.

Ein annar máti at viðgera fíggjarlógina er sum fyrsta lið í viðgerðini at geva hvørjum stjóra/stovnsleiðara ein høvuðskarm og nakrar politiskar setningar: "Vit vilja ...". Saman við samgonguskjalinum ber stjóranum á økinum til at gera eitt uppskot til fíggjarkarmar innan sítt egna øki og hvussu hesin sjálvur metir karmarnar virka uppá langt sikt.

Har tann politiski myndugleikin ynskir at broyta uppskotið, verður tað gjørt sum broytt politisk ynski. Stjórin broytir uppskotið samsvarandi — inntil bæði stjóri og politiskur myndugleiki kenna seg tryggar við at tann politiski setningurin verður náddur samstundis sum teir formligu karmarnir styðja skilagóða atferð.

Grundsjónarmiðið er, at stjórin átekur sær leiðsluábyrgd – og fær leiðsluheimildir.

Hesin seinni arbeiðsmátin var brúktur í sambandi við landsvegirnar øll kreppuárini seinast í 80-unum og fyrru helvt av 90-unum. Hóast umsetningurin hjá stovninum, sum varðar av, er fallin við 70%, so er einki hóttafall á vegunum. Maskinparkin hevur tað ikki gott, men við skilagóðari atferð eisini tey næstu árini ber væl til at fáa tann partin, sum landið skal taka sær av, at virka optimalt aftur, uttan at brúk er fyri tvey- og trýsiffraðum milliónaupphæddum hvørt árið.

Vildi illa til, so høvdu landsvegirnir helst havt ein íløgutørv uppá nærum hálva milliard kr. í asfaltering og høvuðsumvælingum av niðurslitnum vegum. Hetta umframt tær milliónaíløgur, sum eru ynskiligar fyri at gera vegakervið betur, og sum í dag verða viðgjørdar.

**Niðurstøða**
Fólk tykjast samd um, at skipanin í almennu umsitingini viðvíkjandi fíggjarlóg, ráðgeving, útinning o. s. fr. ikki er nóg góð. Hetta man vera í lagi.

Fólk tykjast eisini samd um, at tað er natúrligt, at ein øgiligur íløgutørvur nú stingur seg upp eftir kreppuna. Hetta er ikki í lagi. Ein so øgiligur íløgutørvur átti ikki at komið fyri. Har má onkur – og ikki bert politikarar – fara niður í skuffuna við heitinum "Hetta átti at verið gjørt betur".

Er viljin til staðar, so eigur at bera til at fáa hetta væl betur. Trupulleikin er, at tað eru nógv seráhugamál í samfelagnum, sum hava eitt natúrligt ynski um, at tann almenni sektorurin ikki virkar væl.

Vónandi kunnu røttu avvarðandi brúka hesar reglur konstruktivt í eini felags stremban eftir einum rímiliga effektivum og vælvirkandi almennum sektori.

**Signar P. Heinesen**



e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Alt hongur í leysum lofti

*Løgmanssteyp og landskapping: Hóast tað bara eru tríggir dystir eftir at spæla í bólkaumfarinum, so er tað bara greitt, at B68 og B36 skulu spæla á heimavølli og at FS Vágar skal spæla á útivølli*



*Mest óvæntaða úrslitið í fyrsta umfarinum í landskappingini mundi vera, at tað eydnaðist runavíkingum at fáa øll stigini við sær aftur úr Klaksvík*

*Mynd: SáH*

Fótbólturin er av álvara farin á rull. Á rull er kanska so nógv sagt, tí í kavaveðrinum hevur tað verið trupult at fingið bóltin at rulla. Tíðliga 2. páskamorgun sá tað einki út. Alt var avkavað, men við handakraft og við stuðli frá vársólini eydnaðist tað at fáa grønu teppini undan kavanum, og allir fimm dystirnir í 1. deild vórðu spældir.

Sambært skipanini skuldi bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið verið liðugt. Tað resta framvegis tríggir dystir, og inntil tað í komandi viku verður greitt, hvussu úrslitini av hesum dystunum verða, ber ikki til at gera endaligu støðuna upp, og harvið ber tað ikki til at siga, hvør skal spæla móti hvørjum í fjórðingsfinaluni.

Einasti bólkurin, sum er liðugt spældur, er bólkur tvey. Har er greitt, at B68 hevur vunnið bólkin, og at B36 er næstbest. Sambært skipanini skal B68 tískil spæla á heimavølli í fjórðingsfinaluni, og tað skal B36 eisini.

B68 skal spæla móti næstbesta liðnum í bólki eitt. Í løtuni sær tað út til, at tað verður NSÍ, men hetta kann broytast. VB kann við sigrum í útsettu dystunum móti KÍ og Sumba røkka upp á tólv stig, sum er tað sama, sum KÍ hevur. Um KÍ ella VB so vinnur bólkin verður treytað av úrslitunum í innanhýsis dystunum millum hesi bæði liðini. KÍ vann 3–1 í Vági. Tað er eisini møguleiki fyri, at VB endar á sama stigatali sum NSÍ. So verður tað NSÍ, sum verður næstbest, tí teir vunnu 3–1 í Vági, meðan VB vann 2–0 í Runavík.

Móstøðuliðið hjá B36 í Gundadali verður besti tríarin. Tað er greitt, at hann verður funnin í bólki trý. Um GÍ vinnur útsetta dystin móti HB, so skulu B36 og HB spæla fjórðingsfinalu í Gundadali. UM HB vinnur útsetta dystin, so skulu B36 og GÍ spæla fjórðingsfinalu í Gundadali.

Tað er eisini greitt, at FS Vágar fer at enda á øðrum plássi í bólki trý. Tað vil við øðrum orðum siga, at FS Vágar skal spæla á útivølli. Mótstøðuliðið verður vinnarin av bólki eitt. Tað er sannlíkt, at tað verður KÍ, men tað kann eisini verða VB.

Vinnarin av útsetta dystinum í Gøtu skal spæla á heimavølli móti næstbesta tríaranum. Hetta kann verða VB, men tað kann eisini verða NSÍ.

Við øðrum orðum er talan um nógvar møguleikar. Síðsti dysturin í bólkaumfarinum verður ikki fyrrenn annað fríggjakvøld, tá VB skal spæla í Klaksvík.

### Meistararnir kiksaðu

2. páskadag kom steypakappingin at standa í skugganum av fyrsta umfarinum í landskappingini.

Mest merkisvert var tað, at meistararnir og steypavinnararnir úr KÍ snávaðu á heimavølli. Síðani NSÍ í 1976 fyri fyrstu ferð royndi seg í bestu deildini, hava teir ongantíð vunnið í Klaksvík. Skírisdag taptu teir 2–0 á heimavølli móti VB í steypakappingini, men so reistu teir seg, og KÍ fekk á heimavølli av at vita – leygardagin í steypakappingini og mánadagin í landskappingini.

KÍ skal sunnudagin í Gundadal at spæla móti HB.

Nýggja HB liðið vann tepran sigur á Sandi. Tað er tíðliga at tosa um topp og botn, men um HB vinnur á KÍ í Gundadali, verða tað seks stig millum hesi bæði sigursvandu feløgini, og tað er ikki so lítið.

B36, sum tað hevur verið stórur ivi um, og B68, sum hevur nógv nýtt og roynt fólk, vunnu bæði. Tey hittast á Svangaskarði sunnudagin, har tað verður toppdystur.

Vágbingar, sum fingu trý stig í Sumba, fáa nýggjan møguleika, tá B71 kemur á vitjan, og tað er heilt víst, at í hvussu so er annað av liðunum fer at koma á stigatalvuna, tá sumbingar sunnudagin fara at vitja í Gøtu.

JH



# Fleiri um boðið

*Líkt er nú til, at fleiri føroysk feløg sýna áhuga í at knýta Óla Johannesen at sær*

JÁKUP MØRK

Fyri stuttum frættist, at tvørámenn arbeiddu við ætlanum um at fáa Óla Johannesen heim aftur at styrkja liðið í royndunum at vinna sær sætið aftur í bestu deildini.

Sum skilst, eru hesar ætlanir enn ikki sleptar, men líkt er nú til, at TB fær kapping frá øðrum feløgum, sum eisini vilja hava fatur á undirskriftini hjá landsliðsmanninum.

### GÍ eisini um boðið

Fyrrapartin í gjár frættist nevnliga, at gøtumenn eisini hava vent sær til AGF, fyri at vita um møguleiki er fyri at fáa landsliðsleikaran í hópin hetta kappingarárið.

Sambært teimum upplýsingum, sum Sosialurin hevur fingið fatur á, hevur AGF boða føroysku feløgunum frá, hvat kostnaðurin fyri at leiga Óla Johannesen er, og sum skilst hava føroysku feløgini eisini gingið leiðsluni á møti í peningaliga spurninginum.

Sostatt er tað nú upp til Óla sjálvan at avgera, hvørt hann framhaldandi skal royna at vinna sær pláss á AGF liðnum, spæla fyrstudeildarfótbólt í Gøtu ella fara aftur til barndómsfelagið at spæla í næstbestu føroysku røðini.

Sjálvur sigur Óli, at hann enn ikki hevur gjørt av, hvørja støðu hann fer at taka í málinum. Væntandi verður hetta tó avgjørt ein av fyrstu døgunum, og sjálvur vil Óli ikki útiloka nakran av møguleikunum.

Allarhelst eru tað eisini fleiri lutir, sum spæla inn, tá henda avgerðin skal takast. Danska felagið hevur júst skift út á venjarasessinum, og um nýggju venjararnir hava størri álit á føroyinginum, er lítið at ivast í, at hann verður verandi við tí fyri eyga at vinna sær sætið á liðnum.

Eru útlitini fyri spælitíð á besta liðnum ikki betraði, røkist hinvegin fyri, at landsliðsmaðurin kemur aftur til Føroya, men har er spurningurin so, hvat felag skal hava ágóðan av fótbóltsevnum hansara. Stóri spurningurin í hesum sambandi er helst, hvussu verður við landsliðssessinum, um Óli komandi tíðina fer at spæla í aðru deild.

### Skaðin batnaður

Í løtuni dregist Óli Johannesen við einum skaða í knænum, sum eisini hevur noytt hann at geva avboð til landsdystin móti Liktinstein.

Sjálvur sigur Óli tó, at talan ikki er um nakran álvarsligan skaða, og at hann nú so spakuliga er um at fara í holt við regluligu venjingina. Seinastu tíðina hevur tað annars mest verið í rúminum til styrkisvenjing, at Óli hevur nýtt venjingartímarnar, men vónandi gongur ikki leingi, áðrenn hann aftur er at síggja á grasinum. Hvørt hetta so verður ektað gras ella graslíki fer tíðin at vísa.